# Lise Nolsøe 70 ár

Mánadagin 23. oktober 2006 fylti Lise Nolsøe, fyrrverandi yvirlækni á psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum, 70 ár.

Lise, f. Foss, er donsk, ættað úr Hodder/Thistrup í Suðurjútlandi og bleiv liðug sum lækni 27 ára gomul. Kom til Føroya fyrst í 60-unum, har hon arbeiddi á medisinisku deild á Landssjúkrahúsinum. Hon hevur arbeitt í Føroyum í fleiri umførum á psykiatriska deplinum.

Hon hevur eisini arbeitt á ymiskum psykiatriskum sjúkrahúsum í Danmark. Arbeiddi í fleiri ár á Statshospitalinum í Nykøbing Sjælland. Hevur eisini arbeitt í Augustenborg, í Risskov, í Esbjerg og í Hviding, alt innan fyri sálarsjúku. Í 1979 varð hon so útbúgvin serlækni innan psykiatriina.

Seinastu 10 árini hevur Lise arbeitt sum yvirlækni á Psykiatriska Deplinum. Hon var øll hesi árini „fast inventar“ á Deild 1 og Deild 5, men sjálvsagt vóru eisini nógvar aðrar uppgávur at loysa, sum stundum vóru sera krevjandi. Her verður eisini hugsað um, at tey seinastu árini hava tað bert verið tveir yvirlæknar fyri alt økið, so ikki kann sigast annað enn, at allar hesar krevjandi uppgávur hevur Lise klárað heilt væl, til hon so



gavst vegna aldur í august í ár. Sum ein av starvsfeløgunum segði í eini føðingardagsheilsan til hana: „Og alligevel føler jeg, tilsammen med de fleste andre af dine kolleger, at du ved din faglige arbejdsindsats, dit alment menneskelige engagement, positive, optimistiske livssyn, samt humoristiske måde at være sammen med os på, tilsammen udgør en vigtig del af det posale liv på Lægegangen“.

Lise var væl dámd av sjúklingunum, hon var góð við sjúklingarnar og teir við hana.

Við sínum stillføra og fyrikomandi verimáta skapti hon eitt vinarlag millum seg og sjúklingarnar. Tað sást best, tá hon gavst – hon fekk hópin av gávum frá sjúklingunum.

Nú Lise er givin at arbeiða, fer hon ikki at falla í fátt fyri tað. Hon gongur høgt upp í listina, er til allar tær framsýningar sum eru, hon hevur umhugsað at tikið skeið í “kunsthistorie”. Gongur eisini til russiskt og til foto. Hon hevur eitt stórt dyrkilendi í Hodder, har hon gongur við lív og sál uppí hvussu alt nørist í besta blóma, har er alt, ein kann hugsa sær, ið veksur av grønmeti og fruktum. Hon veltir eplir, øll sløg av káli, gularøtur øll sløg av berum og mangt annað. Soleiðis er Lise, alt sum er livandi og grør, gongur hon fult upp í við likam og sál.

Í 1971 giftist Lise við Páll J. Nolsøe, landsskjalavøri, sála, sum t.d. skrivaði Føroya Siglingarsøgu. Páll doyði í 1996.

Lise eigur ein son, sum eitur Jens og býr í Klampenborg, og ommudóttrina, Carla.

Lise var burturstødd føðingardagin.

# Lista- og søgutúrur í Sandoynni

### Til skúlaflokkar og barnagarðar

Um tit hava hug at uppliva Sandoynna á ein øðrvísi hátt, so er møguleikin her. Listasavnið á Sandi og Kunningarstovan her hava lagt høvdini saman og smíðað eitt tilboð til bólkar. Hetta er ein sera áhugaverdur túrur, ið byrjar við at Teistin fer av Gomlurætt kl. 9.45 um morgunin. Komin til Skopunar koyra bygdaleiðir til Listasavnið á Sandi. Inni á Listasavninum er møguleiki at síggja áhugaverdir málningar. Farið verður víðari at síggja Sands kirkju og so norður í Bygdasavnið í Koytu. Síðani verður gingið yvir í Urð at hyggja at Gívrunarfóti. Bussur fer aftur av Sandi kl. 13.15, og Teistin fer av Skopun kl. 14.00.

Túrurin er eitt bólkatilboð, ið kann lagast til aldurin á



teimum luttakandi, og um onnur ynski eru, ber væl til at broyta tilboðið.

Tað ber eisini til at fáa ein drekkamuð við í tilboðið, men eisini er møguleiki at hava matpakka við.

Vendið tykkum til Kunningarstovuna og hoyri nærri.

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Poul Sigurd Nielsen í Trongisvági**, ættaður úr Fámjin, fer úr kapellinum á Suðroyar Sjúkrahúsi, í kvøld kl. 18.00, í Tvøroyar kirkju. Jarðarferðin verður úr Tvøroyar kirkju hósdagin kl. 14. Sálmabókin verður nýtt.

**Borghild Højgaard, Rituvík**, andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 24. oktober, 80 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Kistan við **Jon Haraldsen, Vestmanna**, fer úr Landssjúkrahúskappelinum í kvøld kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vestmannakirkju hósdagin kl. 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Jon, kunnu lata eina peningagávu til Føroya Blindafelag; konta í Føroya Sparikassa.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri pápi, verpápi og abbi okkara

**Poul Sigurd Nielsen**

Trongisvágur, ættaður úr Fámjin

andaðist leygardagin 21. oktober, 85 ára gamal á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Kistan fer úr kapellinum á Suðroyar Sjúkrahúsið, ónskvøldið 25. oktober kl. 18.00 í Tvøroyrar kirkju.

Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju tórsdagin 26. oktober kl. 14.00.

Sálmabókin verður nýtt.

*Familjunnar vegna*

**Páll og Alvi**

**Dagurin í morgin**

**26. oktober. Amandus.** Fleiri halgimenni bera hetta navn, og allir hava teir verið biskupar, og allir hava sama halgidag. Ikki er gjørligt í dag at gera av, hvønn sipað verður til. Navnið er av latínskum uppruna og merkir: tann sum eigur at verða elskaður.

Sosialurin

Lesið Sosialin

-tað loysir seg!